# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í 1/2 tíð hjá Tórshavnar havn.

**Arbeiðsuppgávur:**
Útrokning av vørugjaldi
Journalisering (DocuLive)
Telefonavgreiðsla
Skrivligt samskifti
Annað skrivstovuarbeiði

**Setanarviðurskiftir:**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge tlf. 31 17 62

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu vera Tórshavnar havn, Postboks 103, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 30. apríl 2001.

**Tórshavnar havn**

# Bókavørður

Á Fuglafjarðar Bókasavni er eitt starv sum bókavørður leyst at søkja til ***1. august 2002***.

Tann, ið sett/ur verður, skal arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum, sum bókasavnið.

Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður.

Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við próvskjølum verða at senda Fuglafjarðar býrráð, Postsmoga 30, 530 Fuglafjørður í seinasta lagi ***14. juni 2002 kl. 15.00***.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á tlf. 444006.

Fuglafjørður, tann 15. apríl 2002.
**Fuglafjarðar býráð**

Hús í Íslandi til leigu
Gisting í Rangárþingi
HELLIRINN ÆGISSÍÐU
v/HELLU

Hús: S:8683677
76m², 4 herb., eldhúsaðstaða.
25 m², eldhúsaðstaða.
Sími: 487 5871



# Sethús í Hvalba til sølu

Við hesum verður matr. nr. 121 í Hvalba lýst til sølu.

Talan er um grundøki, vídd 843 m², við ástandandi eldri sethúsum og úthúsum.

Húsini kunnu síggjast eftir nærri avtalu.

**Suðuroyar Sparikassi**
900 Vágur
tlf. 373064

# Kunngerð
**um løgtingsval í Fuglafjarðar kommunu**

Til veljarar til løgtingsvalið 30. apríl 2002 í Fuglafjarðar kommunu.

Atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin 30. apríl 2002 fyri bygdirnar Fuglafjørður og Kambsdal, og í húsunum hjá Annu Jensen fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 10.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð. Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma í valstøðini, kunnu velja við at venda sær til býráðsskrivstovuna **tlf. 444006** innan kl. 15.00 tann 29. apríl 2002.

Seinasti dagur fyri brævaatkvøður er **mánadagin 29. apríl 2002**.

Fuglafjørður, tann 17. apríl 2002.
**Fuglafjarðar býráð**

# Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan til løgtingsvalið tann 30. apríl 2002 verður á kommunuskrivstovuni í Leirvík.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapartin og heldur fram til kl. 20.00 og so leingi veljarar møta uttan steðg.

Valkort verða send øllum, ið sambært vallistan hava valrætt í Leirvíkar Kommunu.

Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

**Brævatkvøður**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, mugu boða kommunuskrivstovuni frá. Seinasti dagur fyri brævatkvøðugreiðslu er mánadagin tann 29. apríl 2002.

Leirvík tann 23. apríl 2002
**Leirvíkar Kommuna**

# Mjørkadal Idrætsforening
afholder

## FÆRØ MARCH
## 26. april (St. Bededag)
## kl. 1200

Mjørkadal Idrætsforening afholder igen i år den traditionelle FÆRØ - march. Det er i år 25. gang marchen afholdes, det vil vi gerne markere med præmier til alle der gennemfører marchen.

| | |
|---|---|
| Startsted: | FK-HOYVIK |
| Ruten: | FK/Hoyvik - Vegurin Langi - Sundsvegurin - Norðari Ringvegur - Oyggjavegur Húsareyn - Mjørkadal. |
| Forplejning: | Der vil være en ledsagebil, der medbringer kaffe, sodavand, chokolade mm. Der kan købes pølser mm. i personaleforeningens lokaler i Mjørkadal. |
| Startgebyr: | Det er gratis at deltage. Ingen tilmelding. |
| Præmie: | Der er præmie + diplom til alle der gennemfører. |

Vel mødt, MIF

## Heimarøktin øki 5
## Suðuroy

# Sjúkrasystir

Søkt verður eftir sjúkrasystir til Heimarøktina øki 5, at arbeiða 30 tímar um vikuna í skiftandi vaktum frá 1. juni. Arbeiði er mest í sunnaru helvt av oynni, úti í økinum og inni á Eldrasambýlinum.

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur kunnleika til eldraøki.

**Lønar- og setanartreytir:**
Stgarvið verður sett sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran tlf. 373907.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvi v.m. sendast til:

**Heimarøktin øki 5**
att: Jastrid Nielsen
900 Vágur

**Umsóknarfreist: 1. mai.**

# Valkort

Hervið verður gjørt kunnugt, at til løgtingsvalið 30. apríl 2002 verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um veljari ikki hevur fingið valkort, skal verða sagt frá á kommunuskrivstovuni, tlf. 424103, innan 29. apríl 2002, kl. 15.00.

**Vestmanna kommuna**



# SKIPASMIÐJAN

## Boltar og skrúvur
stál - sýrufast - messing





*P/F Tórshavnar Skipasmiðja*
*Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25*

*P/F Skipasmiðjan á Skála*
*Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25*

*24 tíma Vakt*
*tel: 21 11 55*

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo

# Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bílígur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman írokna streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.05.02

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla & umbo - Tel. 315600 - Fax 318008

Toll- og Skattstova Føroya

# *Størv sum grannskoðarar*

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skudarinnkreving hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttollurin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

Heimasíða: www.tollskatt.fo

E-mail: streymoy@tollskatt.fo

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru trý størv leys at søkja til setan 1. juni 2002, ella so skjótt til ber. Eitt fast starv fulla tíð, eitt fast starv hálva tíð og eitt starv sum avloysari í 1 ár fulla tíð.

Øll størvini eru á Eftirlits- og innheintingardeildini. Høvuðsuppgávurnar eru eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv**
Tey, sum sett verða í fulltíðarstørvini, skulu hava roknskaparligan førleika, so sum cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving.

Tann, sum settur verður í hálvtíðarstarvið skal hava roknskaparligan førleika, so sum merkonom ella líknandi útbúgving.

Harumframt skulu nýggju fólkini vera fyrikomandi og arbeiðssom og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. trý sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Hallbjørg Hansen á tlf. 310260.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**29. apríl 2002**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

## SYSTKINAAVSL TTUR Œ BARNAANSINGINI


Willian Max Hansen
Eiði


Birgir Mohr
Sandur


Jógvan Páll Poulsen
Klaksvík


Sverri Midjord
Tvøroyri

**JAVNAÐARFLOKKURIN**

www.sosialurin.fo